



Nina Alberg Arge vísir modellið, sum hon hevur gjørt.
– Eg valdi at gera endaligu uppgávuna um listaskúlan á Sandi orsakað av teimum fakligu avbjóðingunum, sigur Nina. ( Mynd Jens Kr. Vang )



Her sæst listaskúlin frá vegnum. Vakri bygningurin og náttúrutrúgva umhvørvið kann geva íblástur til listafólkini.

flatt. Tað var ein fyrimunur hjá mær at hava royndirnar úr Norra, tá ið eg gjørdi uppgávuna um listaskúlan á Sandi, sigur Nina.

Bygningurin fellur inn í landslagið, og tað er eisini hugsanin hjá Ninu.

Tað er eitt samspæl millum náttúruna og bygningin.

- Ofta leita listafólk eftir friði og íblástri, og hetta umhvørvi kann geva teimum íbástur frá okkara vøkru náttúru. Eg rokni við, at tað hevði eisini drigið útlendsk listafólk henda vegin, sigur Nina.

Bygningurin er gjørdur eins og fjallaruturnar. Tað ber til at ganga eftir tekjuni á skúlanum. Eisini verður ein gøta frá skúlanum oman til fjøruna. Sostatt kanst tú fara frá bygdini ein túr til listaskúlan og so víðari niðan í hagan.

- Fyri meg hevur tað stóran týdning, at skúlin passar inn í umhvørvið, og tí havi eg eisini sett ein biograf og eina framsýningarhøll í bygningin. Sostatt kunnu bygdafólkini eisini fáa gleði av skúlanum, og skúlin gerst ein partur av bygdalívinum.

### Ætlar aftur til Føroya

Eftir summarfrítíðina fer Nina niður aftur til Danmarkar, tí at sjeikurin er ikki liðugur at lesa enn. Hon kundi tó hugsað sær at komið aftur til Føroya at búsett seg.

Spurd, um tað er ein marknaður fyri einum arkitekti í Føroyum, sigur hon, at tað er nógv at gera nú. Men tú veitst ongantíð, hvussu framtíðin verður.

- Ofta verða tær føroysku verkætlanirnar so kroystar fíggjarliga, at arkitekturin als ikki hevur nóg mikið frælsi til at gera sítt arbeiði. Kanska føroyingar ikki ordiliga hava skilt týdningin av at fáa bygningar dygdargóðar og vakrar. Tað hevur týdning, tí at modernaði marknaðurin leggur stóran dent á "image", sigur Nina.

- Á arkitektaskúlanum arbeiddu vit sera nógv við verkætlanum. Tað vóru nærum "fantasi-verkætlanir", tí at tað var einans hugflogið, sum setti markið. Vit skuldu ikki hugsa um nakra fíggjarætlan og heldur ikki um lendið. Hetta verður gjørt soleiðis, tí at fremsta endamálið hjá skúlanum er at stimbra okkara hugflog og skapanarevni, og tá er best ikki at seta nakrar avmarkingar.

Nú verður tað spennandi at koma út á arbeiðsmarknaðin og royna meg við eitt sindur øðrvísi fortreytum, sigur Nina.

Framsýning við verkætlanini og modellinum hjá Ninu Alberg Arge verður á Sandi mánadagin. Ætlandi verður eisini ein framsýning í Havn einaferð í September.

## FAKTA

Á skúlanum eru:
Seks linjur
Skulptur
tónleika
leiklist
tekstil
Design og arkitektur
Fjølmiðla

Afturat er:
Køkur
Kaffistova
Biografur
Dansistova
Framsýningarhøll
Kømur